Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Hammer, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Dialysuviðgerð á Suðuroyar sjúkrahúsi

Spurningar:

1. Nær ber til at fáa dialysuviðgerð á Suðuroyar sjúkrahúsi?

Viðmerkingar:

Tað hevur verið eitt brennandi ynski í áravís at fáa dialysuviðgerð í Suðuroynni. Nógvar royndir eru gjørdar, men tíverri hava heilsumyndugleikarnir í miðstaðarøkinum valt ikki at raðfesta hesar ætlanir.

Dialysusjúklingar, ið hava verið búsitandi í Suðuroynni, hava tískil, skuldu teir fáa viðgerð, verið noyddir av oynni tríggjar ferðir um vikuna, í øllum veðri, norður á Landssjúkrahúsið.

Tað er óskiljandi, at viljin ikki hevur verið til staðar at geva hesum heilsubótina á staðnum, tá tað er øllum kunnugt, hvussu sjúk tey kunnu vera, og hvussu strævin túrurin til Havnar er hjá teimum.

Nøkur hava longu valt at flyta av oynni, frá hús og heimi, tí tey ikki orkaðu meira.

Fyri at koma hesum sorgarleiki til lívs hevur politiska skipanin, av sínum eintingum, oyramerkt pening á fíggjarlógini til dialysutól og rakstur. Útgerðin er sett upp á Suðuroyar sjúkrahúsi og er klár at seta í gongd 18. september í ár.

Tí er sera umráðandi, at viðgerðin ikki verður forhálað longur. Okur mugu fáa at vita, júst nær dialysusjúklingar, búsitandi í Suðuroynni, kunnu vænta at fáa dialysuviðgerð á Suðuroyar sjúkrahúsi.

Á Løgtingi, 13. September 2023

Bjarni Hammer